# BÓKASÍÐAN

bøkur, bøkur, bøkur…



*Ritstjórn: Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

# Dunandi stillar tilverur

**Við sínum knappa stíli fær høvundurin Helle Helle lívsins stillu tilverur at duna í høvdinum á lesaranum, so tað illa ber til at sleppa teimum aftur**

SKALDSØGA

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Ein kvinna traðkar út úr einum bussi hálandi eitt lítið rullikuffert eftir seg. Hon veit ikki, hvagar hon er á veg, veit bara, at hon leitar eftir einum góðum staði at gráta.

Kvinnan er júst farin úr einum hjúnarlag, sum ikki hevði nakra meining longur. Hon er rithøvundur men hevur skrivikrampa, og megnar ikki longur at seta orð á, hvussu meiningsleyst alt kennist.

Við orðunum hjá okkum vanligu deyðiligu ljóðar nýggja skaldsøgan Ned til hundene eftir danska høvudan Helle Helle, sum ein heldur keðiligur umgangur av eini kvinnu, ið heldur átti at fingið sær eitt lív. Men við knappa stílinum hjá høvundanum, har alt er skorið inn á bein, verður søgan um kvinnuna, sum leitar eftir einum staðið at gráta, meir at kalla eitt eksistentielt drama.



*- Hvat vil tað í grundini siga, at vera til, er spurningurin, ið rungar stillisliga gjøgnum nýggju skaldsøguna hjá danska rithøvundanum, Helle Helle*

## Vit gera onki …

Komin út úr bussinum hittir kvinnan tey bæði John og Putte, sum bjóða henni heim við, tí næsti bussur fer ikki fyrr enn dagin eftir. Hvussu kvinnan eitur í veruleikanum, fáa vit ongantíð at vita, men tey bæði gera av at kalla hana Bente.

Skjótt varnast Bente, at heimið hjá John og Putte neyvan er besta staðið, hon hevur funnið, at gráta í. Tey eru alt ov vinarlig, og Putte tosar um Bente, sum vinkonuna, hon altíð hevur saknað. Putte vissar Bente um, at hon kann bara verða verandi, tí sum hon sigur: "Vit gera onki allíkavæl". Og tey gera veruliga heldur ikki stórt annað enn at tosa, drekka kaffi, hyggja í sjónvarp og spæla lotto.

Fyri at fáa dagarnar at ganga, roynir Bente at skriva. Putte fylgir forvitin við og spyr, um tað, hon skrivar, er slíkt, hon sjálv hevur upplivað

"Tja, jú uppá ein máta. Tað snýr seg mest um vanlig fólk, sum drekka kaffi og tosa og sovorði", svarar Bente, meðan tað spakuliga gongur upp fyri lesararnum, at bókin, sum Bente skrivar, og skaldsøgan, hon er við í, kanska eru tvær síður av somu bók.

## Borið fangar

So við og við verður Bente ein partur av lívinum hjá hesum menniskjunum, beint øvugt síni ætlan, ið var at hvørva og gráta. Og tá fleiri av teimum verða fyri ymsum ógvusligum hendingum, fangar borið. Bente kann ikki longur loyva sær bara at stíga inn í næsta buss, enda eitt tilvildarligt stað og fáa sær eitt nýtt navn, sum hon hevði ímyndað sær. Hon kann ikki loyva sær, at brúka hesi menniskjuni, sum henni lystir, fyri síðani bara at hvørva.

Her fær skaldsøgan eina moralska snaring, sum kann tykjast heldur klichékend, men hjá Helle Helle verður ein spurningur um, hvat eitt lív í grundini er fyri nakað.

Móti endanum ringir telefonin og onkur spyr eftir Bente.

"Vilt tú verða funnin", spyr Putte við horninum í hondini, meðan spurningurin, hvat tað vil siga at finnast, at vera til, verður hangandi í luftini …

# Harry Potter skaðar barnabøkur

Bøkurnar um Harry Potter eru vorðnar eitt haft um beinini á bókayrkinum. Trupulleikin er, at aðrir ritøvundar nú royna at gera sama bókasølubragd sum J.K. Rowling, og harvið lækkar góðskan á barnabókum.

Tað staðfesti italiski professarin í bókmentum, Antonio Faeti, á heimsins størstu barnabókaráðstevnu í Bologna herfyri, har hann stóð á odda í dómsnevndini, sum lat Bologna Ragazzi virðislønina

- Kring allan heim sita høvundar nú og stremba eftir at skriva okkurt, sum líkist Harry Potter. Úrslitið er, at barnabøkur nú á døgum eru alt ov einshættaðar, umframt at alt ov nógvar slíkar bøkur verða givnar út, heldur professarin, sum sigur seg ongantíð hava upplivað nakað líknandi tey 50 árini, hann hevur granskað barnabókmentir.



*- Barnabøkur eru vorðnar alt ov einshættaðar, tí alt ov nógvir høvundar royna at herma eftir Harry Potter bókunum, heldur italiski professarin í barnabókmentum, Antonio Faeti*

Á norska Dagbladet er bókaummælarin, Cathrine Krøger, samd við Faeti í, at barnabøkur eru vorðnar alt ov líkar.

- Tað loysir seg betri at selja hundrað eintøk av somu bók enn hundrað ymiskar bøkur. Ongin ivi er um, at nógva hólið kring hetta ávísa slagið av barnabókum oyðileggur nógv, sigur Catherine Krøger.

Júst hvør hermir eftir hvørjum tykist tó heldur óvist, tí í løtuni situr J.K. Rowling í rættinum, ákærd fyri at hava stolið søguna um Harry Potter frá einum filmi.

Á ráðstevnuni var tað annars ein norðmaður, teknarin Øyvind Torseter, sum vann Bologna Ragazzi virðislønina fyri bestu barnabókina í ár.

**ave**



*Skaldsøgan "Færøblues" avdúkar, at høvundurin hevur sera stóra vitan um føroysk viðurskifti, heldur ummælari á Information*

# Færøblues gott ummæli í Information

Skaldsøgan Færøblues, ið fer fram í Føroyum, fær nú rættiliga gott ummæli í danska dagblaðnum Information.

Tað er Lisbeth Nebelong, sum hevur skrivað Færøblues, og sambært ummælaranum, eru vit týðiliga í hondunum á einum høvunda, sum er sera køn í føroyskum viðuskiftum.

- Høga vitanarstøðið um ikki bara tónleik, men eisini um føroyskan politikk, lívið umborð á einum trolara og um torvskur geva mótspæl og perspektiv í búningarsøguni hjá høvuðspersónunum, skrivar ummælarin, Signe Lindskov Hansen, ið fær eina kenslu av at koma at kenna persónarnar í bókini.

Hóast lýsingin av næstan guddómligu føroysku náttúrini í løtum minnir um eina norðurlendska útgávu postkolonialu romantiseringini av eysturlondum, skaðar hetta ikki lesiupplivingina, heldur ummælarin.

- Heldur gevur hetta skaldsøguni enn eitt lag, sum ger, at hon kann lesast sum ein nútímans mentanarlýsing av Føroyum og mentanarliga sambandinum millum Føroyar og Danmark – og slíkar eru tað ikki ov nógvar av, heldur ummælarin, Signe Lindskov Hansen.

**ave**